# Kenna okkum sum valagn



*Eg frykti, at fólk bara stinga í sekkin longu nú. Og tað verður ein vanlagna fyri stovnin, sigur Páll Heinesen, starvsfólkaleiðari á Strandferðsluni.*



*Vit álitisfólk hava als onga kunning fingið. Hetta er beinleiðis brot á allar avtalur, og havi eg eisini vent mær til Starvsmannafelagið um málið, sigur Tórfríð Johannesen, álitisfólk.*

**Kunningin til starvsfólkini á Strandferðsluni hevur verið somikið vánalig, at vandi er fyri, at stovnurin liggur í skeljasori, áðrenn hann flytur til Tvøroyrar. Hetta siga starvsfólk og álitisfólk á stovninum.**

STRANDFERÐSLAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Dagurin í gjár var ein óeydnudagur hjá starvsfólkunum í umsitingini hjá Strandferðsluni. Fyrst fingu tey ein skelk, tá tey lótu upp fyri telduni um morgunin, og á Portalinum lósu, at stovnurin tey hava starvast hjá í mong ár, skal flytast til Tvøroyrar.
Síðani komu fundarboð frá Niels Juel Arge, virkandi stjóra, har Jacob Verstergaard, landsstýrimaður í samferðslumálum greiddi frá, at stovnurin verður fluttur per 1. januar 2008, og at tey 21 starvsfólkini vóru vælkomin at fylgja við suður.

## Skelkað álitisfólk

Ikki minst vóru álitisfólkini skelkað, tí hóast tað stendur púra greitt í sáttmálanum millum stovnin og Starvsmannafelagið, at álitisfólkini skulu vera við í tilgongdum, sum hava kollveltandi broytingar við sær, vórðu tey ikki kunnað um málið.
Harumframt vóru fólk ikki sørt ørkymlaði av, at landsstýrismaðurin onki boð hevði uppá, hvussu framtíðin, uppsagnartíðin og skiftistíðin ítøkiliga fór at verða skipað, nú tað var greitt, at nógv teirra mistu arbeiðið. Hetta skuldi nýggi stjórin, sum søkt verður eftir fyrsta dagin, skipa fyri.
Sum skilst hevur onki av teimum 21 starvsfólkunum á Strandferðsluni ætlanir um at flyta til Tvøroyrar.

## Stórt inntriv

Regin Vágadal, rakstarleiðari á SSL, sigur við Sosialin, at nógvir spurningar vóru settir, sum snúðu seg um viðurskifti hjá tí einstaka starvsfólkinum.
- Samanumtikið haldi eg, at hetta er somikið stórt inntriv, at tann einstaki hevur krav uppá at fáa innlit í, hvat framtíðin bjóðar. Eg hevði í øllum førum ikki




## Vit søkja eftir M/K skjótast gjørligt til Babysam

Vit leita eftir starvsfólki, ið er ja-ligt, dámar væl at selja og sum tað er lætt at samstarva við.

Talan er um antin tvey størv 15-20 tímar, ella eitt starv umleið 30 tímar.

Meira um starvið fæst við at ringja til leiðaran á telefon 31 51 01 ella senda umsókn til Babysam, Miðlon.



